## Starvslesandi í Vinnuhúsinum

Við hesum verður søkt eftir starvslesandi til Vinnuhúsið. Lesandi kunnu søkja um at koma í starvsvenjing, um tey t.d. hava áhuga í at kunna seg um ávíst vinnuøki í sambandi við lestraruppgávu ella í sambandi við teirra lestrarøki sum heild.

**Uppgávur**
Tann starvslesandi fær eina høvuðsuppgávu at loysa, sum er tengd at fakligu bakgrundini hjá viðkomandi og tørvinum hjá Vinnuhúsinum. Dømi um eina tílíka uppgávu er at gera kunningartilfar til heimasíðuna, kanna marknaðir, skriva frágreiðing um altjóða rák, gera greiningar av eini vinnugrein ella líknandi. Harafturat fer tann starvslesandi at luttaka í dagliga arbeiðnum í Vinnuhúsinum.

Umsøkjarin er vælkomin í umsóknini at koma við ítøkiligum uppskoti til uppgávu ella verkætlan.

**Førleikakrøv**
Tann starvslesandi eigur at vera lesandi við hægri háskúla og skal í minsta lagi hava lokið útbúgving á bachelor stigi.

Tey, ið søkja, eiga at hava góð samstarvsevni, vera ágrýtin, miðvís, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga umframt hetta at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Setanartreytir**
Starvið er skipað eftir somu reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi hjá tí almenna og er ólønt. Ein viðbót verður tó latin eftir nøktandi starvstíð. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðul verður veittur til møguligar bústaðarútreiðslur.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Maritu Rasmussen, stjóra ella Niels Winther, ráðgeva. Meira kunning um Vinnuhúsið er at finna á www.industry.fo

Umsókn við prógvum og/ella avriti av úrslitum higartil skulu sendast til:

Vinnuhúsið
Postboks 1038,
FO-110 Tórshavn

Ella við telduposti til: industry@industry.fo